# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



Kendu útvarpsmaðurin, Janus Mohr, fer nú undir at gera sendingar á Rás2. Her greiðir hann frá sendingunum á Rás2 fyrrapartin
Mynd: Marika Hill

# Nýggj sendirøð á Rás2

**Mánamorgunin fer nýggj sendirøð í luftina á Rás2. Røðin snýr seg um hendingar, støð, persónar og viðurskifti, sum hava við Føroyar at gera. Tað er kendi útvarpsmaðurin ígjøgnum nógv ár, Janus Mohr, sum eigur hugskotið og samskipar sendingarnar**

ÚTVARP
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Hvat hava Lágtrýst fyrr og nú, Guttorm í Múla, Livurhøgg, Svartideyði, Amtmanshúsini, Sjóverk, Gold Star og blá bók, Kórsangur á Toftum, Mikkjal í Lamba, Kvívíks Jógvan og Ólavur á Heygum til felags?

Jú, øll hesi evnini eru partur av eini nýggjari útvarpssendirøð á Rás2 undir heitinum, »Føroyar mítt land«, sum fyrstu ferð fer í luftina mánamorgunin klokkan átta. Talan er um stuttar sendingar klokkan níggju um morgunin og klokkan 10 og 11 um kvøldið.

Tað er kendi útvarpsmaðurin ígjøgnum ein hálvan mansaldur, Janus Mohr, ið eigur hugskotið, og sum samskipar sendingarnar. Tær verða skipaðar soleiðis, at ein persónur fær ella sjálvur kemur við einum evni, sum viðkomandi hugleiðir um. Onki mark er fyri, hvat evnið kann vera, bara tað hevur nakað við Føroyar at gera.

Janus Mohr sigur, at íblásturin til sendingarnar kemur frá Danmarks Radio, sum í meiri enn 20 ár hevur koyrt sendirøðina, tey kalla »Danmark kort«.

- Eg hugsaði, at hetta átti at vera ein sera vælegnaður leistur at gera sendingar eftir her hjá okkum, sigur Janus Mohr, sum longu hevur hugskot til eini 200 sendingar, harav ein fjórðingur er avtalaðar við ymisk fólk at gera. Tær fyrstu nógvu sendingarnar eru longu upptiknar og klárar at senda. Sent verður hvønn gerandisdag í vikuni. Ein sending hvønn morgun klokkan 8, og sum eisini verður send klokkan 9, 22 og 23.

Janus Mohr, ið sjálvur hevur gjørt fleiri av sendingunum, leggur dent á, at hann fegin vil hava samband við fólk, sum hava hugskot til evni at taka upp. Hann vísir á, at tað stórt sæð onki mark er fyri, hvat sendingarnar kunnu snúgva seg um. Bara talan er um hendingar, støð, persónar ella viðurskifti, sum hava við Føroyar at gera.

**Vigar tú ov nógv!**

So kunnu vit hjálpa tær við at broyta matvanar og liva meira heilsugott



**Vit byrja týsdagin 11. mars**

| kl: | Týsdag | kl. | Mikudag | kl. | Hósdag |
|---|---|---|---|---|---|
| 09.00 - 10.30 | Byrjaðar | 09.00 - 10.30 | Byrjaðar | 09.00 - 10.30 | Byrjaðar |
| 11.00 - 11.45 | Framhald | 11.00 - 11.45 | Framhald | 11.00 - 11.45 | Framhald |
| 13.00 - 14.30 | Byrjarar | 13.00 - 13.45 | Framhald | 13.00 - 14.30 | Byrjarar |
| 17.00 - 18.30 | Byrjarar | 17.00 - 18.30 | Byrjarar | 13.00 - 14.30 | T2/diabetes |

**Undirvísarar:** Joan M Djordjevic og Jóhanna á Tjaldrafløtti
**Undirvíst verður:** í viku 11, 13, 14, 15, 16, 18, 20 og 21
**Feitt prosentið:** verður mált 3. hvørja viku.
*- eisini fáa tit eina sáltna uppskrift hvørjaferð møtt verður*

| | | |
|---|---|---|
| *Byrjaðar:* | 90 min | kr. 700,- |
| *Framhald:* | 45 min | kr. 500,- |
| *Typa 2 Diabetes:* | 90 min | kr. 700,- |

**Tilmelding** á tel. 456974, ella á heimasíðuni www.husarhaldsskulin.fo

**Húsarhaldsskúli Føroya**
Stoksoyravegur 29
FO-700 Klaksvík
Tel. 456974
www.husarhaldsskulin.fo

HSF

crea 458006